gult cyan magenta svart

FØ‹INGARDAGSHEILSAN. – Eru vit vor›in klókari øll somul, meira opin so at vit fata meir? Ella er Ingálvur veruligan blivin »ov lekkur«, su,m hann sjálvur spyr í filminum »Svartur sannleiki«. Ella er ta› bara tí, at hann ver›ur 80 ár mánadagin og eftirhondini er vor›in kendur sum ein tann besti klassiski modernisturin í nor›urlendskari myndlist?

Tey ganga á vegnum og bí›a, 1988, 200 x 240 cm, Fró›skaparsetur Føroya

Ivin heldur lív í listini

Kinna Poulsen

Tá Ingálvur av Reyni hevur myndir vi› á frams‡ningum, ver›a tær seldar beinanvegin. Hetta var til dømis galdandi fyri frams‡ningina, hann hev›i á Galleri Trap í Keypmannahavn í 1997 og fyri frams‡ningina, hann hev›i í Galleri Åhuset í Køge í fjør. Tá stó›u fólk í kø fyri at keypa. Á sama hátt var keypihugurin øgiligur á frams‡ningini, sum nú var í Listaskálanum . Nóg væl, at fólk ikki fóru til hendurs. Ingálvur er sjálvur harmur um sín stóra fólkatokka, tí hann ivast og heldur fólkatokka vera eitt tekin um, at myndirnar ikki eru nóg erligar og gó›ar. Men hvat er hent? Alt ta›, eg minnist, var ta› heilt vanligt at flenna eitt sindur at teimum gráu og myrku, abstraktu myndunum hjá Ingálvi, sum í øllum førum ikki líktust tí, sum heiti› sipa›i til, antin ta› var úts‡ni yvir Nólsoynna, Mi›vágsbygd, ella okkurt anna›. Men eru vit so vor›in klókari øll somul, meira opin so at vit fata meir? Ella er Ingálvur veruliga blivin "ov lekkur", sum hann sjálvur spyr í filminum "Svartur Sannleiki". Ella er ta› bara tí, at hann ver›ur 80 ár mánadagin og eftirhondini er vor›in kendur sum ein tann besti klassiski modernisturin í nor›urlendskari myndlist?

Læruár

Ingálvur av Reyni fór ni›ur í 1938 at ganga á tekniskúlanum hjá Bizzie Høyer, har eisini m.a. Ruth Smith hev›i gingi› nøkur ár frammanundan og fyrireika› seg til upptøku á kunstakademinum. Ingálvur kom á akademi› í 1943 og fekk har Kræsten Iversen og sí›an Axel Jørgensen til lærarar. Um hin fyrra sigur Ingálvur í bókini Rød Regn: "Kræsten Iversen var en udmærket underviser og en god kunstner, som givet fik en vis betydning for min videre udvikling. Ligesom han, følte jeg mig i det hele taget tiltalt af traditionerne fra den generation af klassiske modernister, som talte Giersing, Weie, Isakson, Rude og Høst". Í fyrstu syftu var ta› tó Axel Jørgensen, sum var tann, i› ávirka›i tann unga málaran mest. Professarin kravdi av sínum næmingum, at teir uttan fyrivarni skuldu fylgja hansara veglei›ing me›an teir gingu á akademinum. Hansara frálæra skuldi seta síni ófravíkiligu spor á eitt heilt ættarli› av donskum listafólkum. Hann var ein sera mi›vísur lærari, i› var sera bundin at teirri vísindaligu litskipanini, sum stavar frá fronsku n‡mpressionismuni og sum er grunda› á mótsetningslitirnar og vi›urskiftini teirra millum: "Farverne opstår for vor bevidsthed gennem vort øjes møde med to farver, som hver især kun får sin eksistens ved hinanden. Før man møder en farves modsætning eksisterer farven ikke" (Axel Jørgensen, Gnisten og Ilden). Vi› stø›i í hesi litskipanini mála›i Ingálvur av Reyni sínar myndir, sum so lí›andi gjørdust meira og merira litríkar. Ta› tók honum mong ár at koma burtur frá tí, hann hev›i lært og finna sín egna veg. Hann byrja›i at brúka brúnt og grátt; litir, sum Axel Jørgensen hev›i bannl‡st. Hann leita›i og fekk í tøkum tíma íblástur frá einum dana, sum av fyrstan tí› var komin Føroya vi› bretska herinum. Jack Kampmann búsettist í 1948 í Føroyum og fekk vir›ismiklan t‡dning fyri føroyska listaumhvørvi›. Franski málarin Paul Cézanne var ein umrá›andi fyrimynd hjá Kampmann eins og koloristiska flatumálarí› hjá danska listamanninum Immanuel Ibsen fekk stóran t‡dning, eisini fyri Ingálv av Reyni. Umvegis Kampmann og Ibsen skilti Ingálvur av Reyni, at ein einstakur litur kundi vera berandi í myndini. Tá henda høvu›streyt var lokin, kundi eitt bjart litidæmi leggjast aftrat myndina, men ikki ov nógv. Myndirnar hjá Ingálvi gjørdust nú myrkari og stø›ugt einfaldari bæ›i vi›víkjandi litavali og kompositión. Spakuliga fann hann sítt egna stev og tordi at nærkast tí nonfigurativa.

Frambrot

Í 1961 hev›i Ingálvur av Reyni eina frams‡ning, sum hann sjálvur metir vera avgerandi fyri sína listarligu lei›. Á frams‡ningini hingu fleiri nonfigurativar myndir vi› heitinum Kurpali. Tann eina av teimum er avmynda› í stóru bókini um Ingálv, sum júst er endurútgivin. Á lítla lørifti› (55 x 40 cm) eru mála›ir f‡rkanta›ir og avlangir flatar, i› saman mynda eina vertikala kompositión, sum er sundurb‡tt í t‡ avlong skap. Tey ytru eru myrk, svørt, brún og grá og rípan í mi›juni er ljósari eisini í gráum og brúnum litum. Naka› ovarliga koma bjartir litir undan; reytt og gult. Fyrst og fremst er myndin eitt frálíkt dømi um litskipanina hjá á›urnevnda Ibsen, men hon er sjálvandi anna› og meira enn ta›. Tann ljósari rondin gerst brei›ari uppeftir, men myndin tykist allíkavæl halda eini javnvág m.a. av tí, at rondin eisini gerst brei›ari ni›ast, har hon líkasum fær ein fót at standa á. Kompositiónin er harmonisk og vælskipa›, men allíkavæl er einki stø›ufast yvir myndini. Ta› tykist sum um okkurt er vi› at henda; ljósi› br‡tur sær veg fram úr myrkrinum. Nú var ta› ikki solei›is, at Ingálvur av Reyni kom inn á nonfigurativa lei› fyri at vera. Allatí›ina hevur hann mála› landslagsmyndir vi› einum meir ella minni abstraktum myndamáli›.

Flatumálarí

Landslagsmyndirnar fáa upp gjøgnum sekstiárini alsamt hægri sjónarring, sum meir og meri líkist eini rípu uttan d‡pd. Eisini eru landslagsformarnir umgyrdir av tjúkkum, svørtum konturlinjum. Tessvegna er talan um nakrar rættiliga stilisera›ar og ónaturalistiskar landslagsmyndir, har dentur ver›ur lagdur á sjálvan yvirflatan á løriftinum. Seinni í sekstiárinum ver›ur henda stranga skipanin av myndevninum avloyst av fríari pensilsstrokum og ekspressivum sterkum litum. Hesar myndirnar hava í stóran mun givi› nógvum føroyskum listafólkum íblástur.

Ein gátufør mynd

Ein onnur mynd, sum eg ikki kann lata vera vi› at nevna, er "Gráur morgun" frá 1970, sum er ogn Føroya Listasavn. Hetta er ein merkiliga afturlætin mynd, sum vi› sínum margt‡dni s‡nist spæla vi› fatanina. Myndevni› er møguliga eitt landslag, men ta› er rættiliga abstrahera›. Sum so ofta í teimum vertikalu kompositiónunum hjá Ingálvi er myndflatin b‡ttur upp í tríggir avlangir formar. Myndarúmi› tykist ógviliga kompakt og tungt, forgrundin fyllir ta› mesta og ikki hómast nógv, i› kann sambindast vi› luft. Ova-liga í myndini sæst ein strika vi› einum rundum skapi omanyvir. Ein sól oman yvir eini havsbrúgv? Ta› er ikki vist, tí rúmdin í myndini tykist fleirt‡›ug. Havsbrúgvin kann eisini vera ovasta linjan í einum stórum avlongum skapi, sum tykist tra›ka fram og sum minnir um eina hur›, tú kanst lata upp. Myndin er gátufør og ógviliga ekspressiv. Grátt finnist í óteljandi variantum og Ingálvur av Reyni man hava granska› teir flestu. Hjá honum er ta› gráa føroyska náttarmyrkri runni› saman vi› eini franskari litkenslu. Ein mynd sum "Háfellislendi›" frá 1983, sum plagar at hanga uppi í Listaskálanum gevur eina ábending um hvat ta› er, sum Ingálvur av Reyni roynir at úttrykkja.Í sta›in fyri at mála eftir og skráseta fjalli› á eitt lørift, ger hann fjalli› til eina mynd, sum er naka› í sjálvum sær. Hann strí›ist vi› myndevninum, abstraherar inntil sjálvur essensurin er eftir. Sjálvur luturin er burtur, bert hugsanin og kenslan eru eftir.

Kurpali 1961, 55 x 40 cm, Marie Louise Hoydal

Trolaradekk 1999, 230 x 380 cm, Føroya Listaskáli

Tey ganga á vegnum og bí›a

Sí›an sjeytiárini hevur Ingálvur roynt seg vi› stórum figurkompositiónum. Ein tann mest vælevdna›a eitur "Tey ganga á vegnum og bí›a" frá 1988. Ein ótrúliga sterk mynd bæ›i listarligt, men eisini hvat vi›víkur innihaldinum. Myndin er lutvíst bygd á minnir hjá Ingálvi um tá hann var barn og sá tey gomlu, sum kanska høvdu mist onkran og nú gingu á vegnum og bí›a›u. Tá hann seinni las Prædikarin kom myndin, sum hann hev›i sæ› í fjørutiog fimtiárunum aftur fram fyri hann og hann fór nú í gongd vi› at mála fólkini inn í eina stóra mynd. Ingálvur hevur í hesu mynd rakt sama dapra og stórsligna tóna sum merkir dapurskygda Prædikaran í kap.12,1-5: *"Hugsa um skapara tín á ungdómsdøgunum, á›renn hinir óndu dagar koma og árini nærkast, sum tú fert at sig um: Tey líkar mær ikki!" Á›renn sól og máni og stjørnur ver›a fjald í myrkri, og sk‡ggini koma aftur eftir regni›, tá i› teir ristast, sum halda vakt yvir húsinum, og hinir sterku menn kropna, tá i› tær, i› á kvørnum mala, gevast, tí tær eru ov fáar, og myrkt er vor›i› teimum, i› út um vindeyguni hyggja, tá í› bá›ar útdyrnar ver›a læstar, og ljó›i› frá kvørnini minkar, so ta› ljó›ar ikki har›ari, enn spurvur letur, og allar tær, i› syngja, ver›a lágmæltar, tá i› ein stúrir fyri hvørji brekku, og ræ›slur lúra á vegnum, tá i› mandlutræi› blómar, tá i› grashoppan ekur seg avsta›, og kapersberi› missir kraftina – nú menniskja› fer avsta› til æviga bústa› sín, og hini syrgjandi longu ganga á vegnum og bí›a –"*. Hetta er eitt koloristiskt meistaraverk. Tá tú stendur naka› frá og hyggur, savnast formarnir til einum ringi av fólki, sum vi› boygdum høvdum ganga runt í eini ævigari ringrás uttan byrjan ella enda. Myndin er skipa› í trimum høvu›slitum, svart, reytt og hvítt, men fert tú nærri, sært tú hvussu ótrúliga rík palettin er vi› grønum, gulum, bláum, brúnum og gráum. Litirnir fáa alla myndina at skyggja á ein linnandi hátt, sum br‡tur ta› har›a og dapra. Kvinnufigururin til vinstru í myndini er ótrúliga vakur, tykist onkursvegna umgyrdur av eini auru av kærleika.

Smáar og stórar myndir

Ingálvur av Reyni hev›i einar fimm myndir vi› á Ólavsøkuframs‡ningini. Mær dámar væl hansara smáu myndir, bæ›i olju- og vatnlitsmyndirnar, sum ofta tykjast meira spontanar og kanska eitt sindur minni tryggar enn tær stóru. Onkrar eru gó›ar, a›rar kanska minni gó›ar og solei›is má ta› vera so leingi listama›urin er opin og leitar. Eitt myndevni, sum Ingálvur hevur arbeitt nógv vi› seinastu árini er trolarin. Ein tann besta av hesum er ein monumental mynd vi› heitinum "Trolaradekk", sum eg sá fyri fyrstu fer› á Den Frie í Keypmannahavn í 1999. Til alla lukku hevur listasavni› keypt myndina, so hon er vor›in partur av føstu frams‡ningini. Á halda fram vi› á henda hátt at hugsa kritiskt og at mála og fram fyri alt vóna vit, at hann fer at halda fram vi› at ivast, tí ivin heldur lív í listini. Vi › hesum or›um vilja vit ynskja Ingálvi av Reyni hjartaliga tillukku á 80 ára fø›ingardegnum

Heimildir:
Finn Terman Fredriksen: Rød Regn 1998
Svartur sannleiki (filmur): Dánjal Højgaard og Hans Petur Hansen
Kinna Poulsen: Hvørja fer› mynd.. Vi›skerin 24. jan 1998

Gráur morgun 1970 180 x 110 cm, Føroya Listasavn